NSÍ–VB 4–0 (2–0):

# Nú er NSÍ oddalið

**Vágbingar spruttaðu eitt sindur fyrstu løtuna í báðum umførunum, men heimaliðið hevði nógv fleiri streingir at spæla uppá enn gestirnir**

NSÍ–VB
*Jóannes Hansen*

NSÍ lyfti seg sunnudagin upp millum oddaliðini, og teir eru ovast á støðutalvuni, eftir at teir á heimavølli vunnu størsta sigurin í teimum tjúgu dystunum, sum higartil eru spældir.

VB varð sent suður aftur við 4–0 tapi í viðførinum, og harvið eiga vágbingar framvegis fyrsta sigurin á. Bæði í fyrra og í seinna hálvleiki gjørdi VB eina roynd fyrstu løtuna at trýsta heimaliðið, men teir vóru sjáldan vandamiklir. Eftir steðgin stútaði Birgir Jørgensen væl ímóti málinum, eftir at innlegg var komið úr høgru, men Jens Martin Knudsen vísti landsliðsstøði.

Annars var tað heimaliðið, sum væl og virðiliga setti dagsskránna. Teir høvdu fleiri góðar atsóknir, og miðskeiðis í fyrra umfarinum eydnaðist at fáa tvey mál. Christian Høgni Jacobsen, sum NSÍ hevur leigað úr Vejle fram til summarsteðgin, var meistari fyri tí fyrra. Úr fjúrtan metrum og mitt fyri smekkaði hann í kassan aftanfyri Bjarna Johansen, eftir at Helgi L.Petersen hevði verið meistari fyri innlegginum úr vinstru.

Tveir minuttir seinni skoraði Jústines R. Hansen fyri fyrstu ferð á besta NSÍ liðnum. Hann hevur vikarierað á miðvallarplássinum í høgru, sum Gert Langgaard hevur verið burtur frá. Ungi maðurin hevur aftur og aftur víst, at hann hevur nøs fyri málmøguleikum, og hesa ferð eydnaðist. Sjúrður Jacobsen legði innfyri úr vinstru, bólturin fór framvið fleiri, og mitt fyri málinum stýrdi Jústines bóltinum í málið til 2–0.

## Fleiri streingir

Í 2. hálvleiki var spurningurin bara, hvussu stórur heimasigurin skuldi verða. NSÍ hevði nógv størri breidd á sínum liði, enn mótstøðuliðið hevði. Jónstein Petersen hevði fleiri góð gjøgnumbrot í vinstru, og einar tvær ferðir fóru royndir hjá honum dygst framvið VB málinum.

Gert Langgaard og Kári Hansen hava verið skaddir, men í 2. hálvleiki vórðu teir settir inn á NSÍ liðið, og harvið er greitt, at kappingin um tey fyrstu ellivu plássini fer at verða uppaftur størri, enn hon hevur verið.

Gert loysti Jústines R. Hansen av. Men áðrenn Jústines fór av vøllinum, hevði hann við at skora til 3–0 mint á, at tað av álvara eigur at roknast við honum. Christian Høgni Jacobsen átti uppleggið, og Jústines var púra leysur mitt fyri, tá ið hann skoraði.

Tá ið VB hevði staðfest, at teir einki fóru at fáa við úr Runavík, vórðu bæði Milan Kuljic og Predrag Zivkovic skiftir út. Poul Poulsen, sum á yngru landsliðunum hevur víst, hvør dugur er í honum, kom á vøllin saman við Halli D. Joensen, sum áður hevur spælt við Sumba.

Tá ið tað restaðu tveir minuttir, staðfesti Sjúrður Jacobsen við langskoti rimmar heimasigurin. Fyri NSÍ lagaðu hini úrslitini seg so mikið væl, at NSÍ eftir fjórða umfarið er topplið.



*Runavíkingar fremstir. Tað er støðan, eftir at NSÍ sunnudagin vant burtur úr vitjandi vágbingunum*

**NSÍ–VB 4–0 (2–0)**
1–0: Christian Høgni Jacobsen 22.
2–0: Jústines R. Hansen 30.
3–0: Jústines R. Hansen 64.
4–0: Sjúrður Jacobsen 88.
NSÍ: Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Messias Perreira, Sjúrður Jacobsen – Jústines R. Hansen (Gert Langgaard, 70.), Ian Højgaard, Christian Høgni Jacobsen, Jónstein Petersen – Sonni L. Petersen (Rúni Rasmussen, 57.), Helgi L. Petersen (Kári Hansen, 80.)
VB: Bjarni Johansen – Dejan Nikolic, Eyðun Jacobsen, Jákup Olsen – Mortan úr Hørg, Dan Djurhuus, Milan Kuljic (Hallur D. Joensen, 81.), Palli Augustinussen, Kári í Lágabø – Birgir Jørgensen, Predrag Zivkovic (Poul Poulsen, 75.)
Gult kort: Mortan úr Hørg og Milan Kuljic

## Máltindarnir

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| Birgir Jørgensen | VB | 3 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 2 |
| Magni á Lakjuni | EB/S | 2 |
| Eyðfinn Fjalsbak | FSV | 2 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 2 |
| Súni Olsen | GÍ | 2 |
| Karsten From | HB | 2 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 2 |
| Rúni Nolsøe | HB | 2 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 2 |
| Jústinus R. Hansen | NSÍ | 2 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 2 |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| Eirikur Joensen | Sumba | 5 |
| Eyðun Samuelsen | AB | 4 |
| Kaj Roest | TB | 3 |
| Johan Dávur Højgaard | B68 | 2 |
| Hanus Eliasen | ÍF | 2 |
| Høgni Zachariasen | ÍF | 2 |
| Dan Mortensen | TB | 2 |
| Rasmus Nolsøe | TB | 2 |
| Bergur Vinter | VB | 2 |

# ÍF einsamallir

**Fuglfirðingar eru nú einasta liðið við fullum stigatali, og AB tykist nú fara at gera um seg**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Hóast hóttanir um samferðsluavleiðingar í verkfallinum, so varð aftur eitt umfar í næstbestu deildini avgreitt um vikuskiftið.

Og eftir hetta er nú greitt, at tað er ÍF, sum er einsamalt á odda í deildini. Hesa ferð høvdu fuglfirðingar vitjan av B71, og heldur ikki hjá teimum eydnaðist at gera nakað við fuglfirðingarnar, so soleiðis fingu sín triðja sigur av trimum møguligum.

## Nógv elta

Sumba hevur higartil verið einasta liðið, sum hevur fylgt við ÍF, men leygardagin máttu teir fyri fyrstu ferð í ár fara stigaleysir av vøllinum. Talan var um vitjan á Tvøroyri, og leingi hevði Sumba gott tak á dystinum, og tá Páll Magnar Kjærbæk í seinna hálvleiki legði teir á odda, sá alt gott út.

Men TB vann seg aftur í dystin, og við tveimum góðum skotum frá Dan Mortensen og Kaj Roest fingu teir vent gongdini. At leikandi venjarin hjá Sumba, Robert Cieslewicz, leikaði somikið nógv í, at hann fekk reytt kort, mundi heldur ikki koma serliga væl við hjá Sumba, nú teir mugu vera hann fyriuttan í týðandi dystinum móti AB komandi umfarið.

Júst AB hevur nú vunnið seg upp á triðja plássið. Teir høvdu vitjan av LÍF um vikuskiftið, og tað var greitt, at her tykist talan vera um eitt lið, sum er á veg upp í røðini. Á liðnum í ár eru eisini fleiri nøvn, sum áður hava gjørt um seg í bestu deildini, og tað er einki at ivast í, at teir í øllum førum ætla sær at vera við frammi í stríðnum um fremstu sessirnar.

Umframt Sumba, TB og AB, so eru klaksvíkingar eisini við í feltinum, sum er beint undir ÍF. Her plagar setningurin hjá KÍ fyri tað mesta annars vera at halda sær í deildini, men leygardagin fingu teir so sín næsta sigur í trimum dystum, tá B68 var á vitjan. Her var KÍ alla tíðina á odda, men móti endanum var tó um reppið, at B68 fekk skapt spenning í aftur, men teir eru tó framvegis stigaleysir í botninum av talvuni.

Seinasti dysturin var í Vági, har B36 fekk sítt fyrsta stig. Eitt skifti vóru teir eisini á odda við einum máli frá Sigmund Mikkelsen, men Bergur Vinter javnaði fyri VB, sum soleiðis tók enn eitt fet upp eftir stigatalvuni, har teir fyri fyrst hava lagt seg um miðjuna.

**Úrslitini um vikuskiftið:**
ÍF-B71 2-0 (1-0)
AB-LÍF 5-0 (2-0)
KÍ-B68 3-2 (3-1)
TB-Sumba 2-1 (0-0)
VB-B36 1-1 (0-0)





*Fyri tað mesta royndu báðir partar at halda nógv fólk heima, soleiðis at lekarnir í verjupartinum ikki skuldu gerast ov storir*

KÍ-B68 0-0:

# Lekarnir eru tettir

**Men hvørki verjan hjá KÍ ella tann hjá B68 vórðu settar undir serligt trýst í tøttu norðoyastevnuuppgerðini, har KÍ misnýtti brotssparkið, sum var einasti opni møguleikin**

KÍ–B68
*Jóannes Hansen*

Fyri triðju ferð síðani tað í 1988 varð soleiðis, at stevnudystirnir samstundis skuldu vera landskappingardystir, hittust KÍ og B68 á norðoyastevnu, og fyri triðju ferð endaði tað við javnleiki. Hinar báðar ferðirnar varð úrslitið 1–1. Hesa ferð kom einki mál.

Toftamenn høvdu undan ferðini um Leirvíksfjørð fegnir viljað selt túrin fyri eitt stig, og tað var ikki verri fyri teir, at teir vunnu brotssparkskappingina og harvið stóra steypið, sum Kjølbro heilsølan hevði givið, og sum gamli málrevurin hjá KÍ, Jákup Mikkelsen, stjóri í Heilsøluni og løgtingsmaður, handaði toftamonnum.

Serliga klaksvíkingar hava havt trupulleikar við at halda tætt í verjupartinum. Nú hava teir fleiri ferðir fokuserað upp á tann partin, og tølini siga, at tað er væl tættari. KÍ er tvær ferðir farið av vøllinum, uttan at mótstøðuliðið hevur skorað. B68 hevur spælt tríggjar dystir á rað, uttan at mótstøðuliðið hevur fingið mál. Í tveimum dystum hevur KÍ skorað eitt mál, og B68 hevur í tríggjar ferðir 90 minuttir fingið tvey mál – eitt brotsspark og eitt sjálvmál!

## Lítið trýst

Tá ið bæði liðini í útgangsstøðu bara hava ein mann á toppinum, og tá ið spælararnir í næstu røð ikki eru altráðir at koma fram í brotsteigin, sigur tað seg sjálvt, at trýstið á málini ikki verður nakað serligt.

Tá ið so nógvir eru á miðvøllinum, so kundi kanska roknast við, at spælið var rótut, men soleiðis var tað ikki. Nærdystirnir vóru dyggir viðhvørt, men teir vóru ikki serliga nógvir, og ofta megnaðu liðini fleiri samanhangandi sendingar. Mest sum ongantíð vóru long skift millum borðini at síggja. Tað vil siga, at javnvágin í verjuspælinum fór so at siga ikki um koll.

B68 hevði onga beinleiðis roynd á málið hjá Kartini Joensen, og KÍ hevði ein møguleika ímóti Alberti Sævarson, men tað skuldi valdast møguleiki. Tríggjar minuttir eftir, at Aleksander Djordjevic, sum leingi hevur verið skaddur og ikki enn er komin heilt fyri seg, var komin á vøllin, legði hann úr høgru og í brotsteigin, har Atli Danielsen, tá ið hann royndi at temja við bringuni, varð skumpaður í ryggin. Brotsspark. Men Allan Joensen sendi ov langt til vinstru fyri seg sjálvan, so bólturin tók uttaru síðuna av stólpanum.

Niklas á Líðarenda leiddi hóvliga. Hann setti ongantíð seg sjálvan í miðdepulin. Fimm minuttir undan steðginum kundi hann havt reyða kortið á lofti, men hann valdi bleytu loysnina, og hon kundi eisini brúkast. Hjalgrím Elttør var komin framum B68 verjuna, og var mitt fyri og eitt lítið vet til høgru á veg í brotsteigin, tá ið Dánial Hansen kom úr høgru og royndi at takla. Hjalgrím fór um koll, dómarin bríkslaði fyri frísparki, og gula kortið kom úr lummanum. Radikalara loysnin hevði sjálvandi havt aðrar fyritreytir við sær fyri seinna umfarinum. Men tað er, so segði maðurin, ein hypotetiskur spurningur.

**KÍ–B68 0–0**
KÍ: Kartin Joensen – Harley Bertholdsen, Sámal Eyðfinn Akursmørk, Ove Nysted, Símun Joensen – Atli Danielsen, Leon Bjartalíð, Allan Joensen, Jan Joensen (Aleksander Djordjevic, 75.), Erling Fles – Hjalgrím Elttør
B68: Albert Sævarson – Dánial Hansen, Hans Fróði Hansen, Arnbjørn Danielsen, John Heri Dam – Bogi Petersen, Fróði Benjaminsen, Jann Ingi Petersen (Kristian Anton Andreasen, 84.), Øssur Hansen, Øssur Jacobsen (Jóhan Petur Poulsen, 70.) – Súni Fríði Johannesen
Gult kort: Hans Fróði Hansen, Dánial Hansen
Dómari: Niklas á Líðarenda

**1. deild menn**

| | | d | v - j - t | mál | mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 4 | 2 - 2 - 0 | 9 | 3 | 6 | 8 |
| 2 | HB | 4 | 2 - 2 - 0 | 10 | 5 | 5 | 8 |
| 3 | KÍ | 4 | 2 - 2 - 0 | 4 | 2 | 2 | 8 |
| 4 | B68 | 4 | 2 - 2 - 0 | 4 | 2 | 2 | 8 |
| 5 | GÍ | 5 | 2 - 2 - 1 | 7 | 6 | 1 | 8 |
| 6 | EB/Streymur | 4 | 1 - 2 - 1 | 6 | 5 | 1 | 5 |
| 7 | FS V | 4 | 1 - 1 - 2 | 6 | 8 | -2 | 4 |
| 8 | VB | 4 | 0 - 2 - 2 | 4 | 9 | -5 | 2 |
| 9 | B36 | 3 | 0 - 1 - 2 | 1 | 4 | -3 | 1 |
| 10 | Skála | 4 | 0 - 0 - 4 | 1 | 8 | -7 | 0 |

**2. deild menn**

| | | d | v - j - t | mál | mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 3 | 3 - 0 - 0 | 6 | 1 | 5 | 9 |
| 2 | Sumba | 3 | 2 - 0 - 1 | 10 | 3 | 7 | 6 |
| 3 | AB | 3 | 2 - 0 - 1 | 8 | 4 | 4 | 6 |
| 4 | TB | 3 | 2 - 0 - 1 | 8 | 6 | 2 | 6 |
| 5 | KÍ | 3 | 2 - 0 - 1 | 7 | 11 | -4 | 6 |
| 6 | VB | 3 | 1 - 1 - 1 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 7 | B71 | 3 | 1 - 0 - 2 | 2 | 3 | -1 | 3 |
| 8 | LÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 4 | 10 | -6 | 3 |
| 9 | B36 | 3 | 0 - 1 - 2 | 1 | 4 | -3 | 1 |
| 10 | B68 | 3 | 0 - 0 - 3 | 3 | 8 | -5 | 0 |

www.smyril-line.com



Søkt verður eftir tveimum fólkum til Farmadeildina

Søkt verður eftir einum skrivstovufólki til Avgreiðsluna og einum til Skaðadeildina, ið er deild undir Farmadeildini. Størvini verða at seta skjótast gjørligt.

Starvið í Avgreiðsluni umfatar:
- Avgreiðslu av inngangandi farmi
- Kundaavgreiðslu
- Vanligt skrivstovuarbeiði

Starvið á Skaðadeildini umfatar:
- Avgreiðslu av skaðasakum
- Kundaavgreiðslu
- Vanligt skrivstovuarbeiði

Førleikakrøv:
Til bæði størvini krevst at umsøkjarin hevur royndir innan skrivstovuarbeiði. Tað er hartil ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur skrivstovuútbúgving.

Neyðugt er, at viðkomandi er vanur at arbeiða við teldu.

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi kann arbeiða sjálvstøðugt.

Setanarviðurskifti:
Størvini eru í høvuðsheitum fulltíðarstørv. Í sambandi við starvið á Skaðadeildini er tó møguleiki fyri niðursettari tíð.

Løn sambært avtalu.

Umsóknir:
Umsóknir við møguligum prógvum skulu sendast til:

*Smyril Line*
*Postsmoga 370*
*FO-110 Tórshavn*

ella við teldupósti til:

*jorgbrus@smyril-line.fo*

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juni 2003.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Jónfinn Simonsen á tlf. 34 59 60 ella 21 76 71.







SMYRIL LINE
J. Bronckgøta 37 · Postbox 370 · FO-110 Tórshavn · Tlf +298 34 59 00
Fax: +298 34 59 50 · Teldupostur: office@smyril-line.fo